# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Norsku miðlarnir eru í øðini um avgerðirnar hjá landsliðsvenjaranum, Marit Breivik. Noreg mátti taka til takkar við 21-21 javnleiki móti Spania*

*Mynd: polfoto*

# Marit Breivik fær høgg fyri síni taktisku val

**Norska ítróttarpressan hevur ringt við at fyrigeva norska landsliðsvenjaranum, at hon tók norska málverjan út í síðstu løtu, tá Noreg førdi 21-20. Danmark í sínum lagi, vann ein dramatiskan dyst ímóti Fraklandi**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Ítróttarskrivarar í Noregi kappast um at finnast at norska landsliðsvenjaranum, Marit Breivik. Norsku kvinnurnar førdu 21-20 ímóti Spania í síðstu løtu, og tær vóru í undirtali. Við støðuna 21-20 valdi norski venjarin, Marit Breivik at taka norska málverjan út, so Noreg kundi spæla 6 útispælarar ímóti 6 útispælarum. Harav tann eini norski spælarin var í málverjuvesti. Tað eydnaðist teimum sponsku spælarunum at bróta álopið hjá Noregi, og Andrea Barno slapp at javna til endaliga úrslitið 21-21. Frode Scheie hjá norska TV2 varð rættiliga ørgur inn á Marit Breivik, at hon ikki tók Time-Out, og at hon tók málverjan út. Scheie helt, at Breivik gekk bara við Time-Out kortinum, uttan at vita, hvat hon skuldi brúka tað til.

– Eg skilji ikki, hví vit taka út málverjan, tá tað eru vit, sum eru á odda. Slíkt er ógvuliga vánaligt. Hetta gjørdi, at vit púrasta blottaðu okkum.

## Breivik verjir seg

Marit Breivik verjir seg:

- Eg trúðu, at fóru at verða førar fyri at spæla tær út við seks spælarum. Tonje Larsen bleiv burturdømd uppá eitt ivingarsamt trøðk, júst áðrenn Marta Mangue hjá Spania skoraði til 21-20. Og royndin hjá Mangue varð trøðk. Heldur Marit Breivik fast um. Tonje Larsen sigur seg heldur ikki skilja, at kroatisku dómarnir, Branka Maric og Zorica Masic ikki dømdu ímóti spanska liðnum, tá hetta málið fall. Norsku spælarnir halda í heila tikið lítið um avrikið hjá kroatisku dómarnum.

– Tað varð ikki lætt at gera av, um eg skuldi leggja timeout-kortið á borðið. Vit kundu jú verið dømdar fyri passivt spæl. Høvdu 15 sekund verið eftir, so hevði tað verið lættari at lagt timeout-kortið á borðið. Nú mugu vit bara seta okkum niður og hyggja dystin ígjøgnum, og vita, um tað er nakað vit kundu gjørt øðrvísi. Undirstrikar Marit Breivik.

Fríggjakvøldið spælir Noreg ímóti Ukraina, sum vann heili 38-24 á Portugal.

## Eykamálverji gjørdist stóra hetjan

Danski málverjin, Christina Pedersen sum spælir við í sínum fyrsta endaspælið, sum A-landsliðsspælari bjargaði Danmark bæði stigini í evstu løtu, tá hon stórbjargaði einum skoti frá Camille Ayglon, sum varð púra einsamøll við unga danska málverjanum.

Danmark vann 24-23 á Fraklandi, og ungi málverjin, sum bert er annað val í FCK Håndbold, aftanfyri norsku Cecilie Leanger, diskaði upp við bjargingum, undir øllum dystinum. Christina Pedersen helt veruliga Danmark inni í dystinum. Í hálvleikinum førdu fronsku kvinnurnar 13-10. Ein annar danskur debutantur, Gitte Aaen stóð eisini sterk í myndini. Hon skoraði 7 mál í 7 royndum.

Teir royndu spælarnir hjá Danmark, kunnu ikki verða eins nøgdar við sítt avrik í kvøld. Rikke Skov, Katrine Fruelund, Henriette Mikkelsen, og Karin Mikkelsen, sum vardi málið í 1. Hálvleiki stóðu allar í skugganum av teimum nýggju spælarunum hjá Danmark. Hesar mugu gera tað betri komandi dystirnar, um Danmark skal vinna seg heilt fram í kappingini

## Betur í 2. hálvleiki

Danmark vardi betur í 2. hálvleiki,og loyvdu finsku dómarnir tær donsku kvinnurnar at fara heilt til strikuna. Danmark legði seg á odda 17-15, og megnaðu tær at halda tepru leiðsluna, tað sum eftir varð av dystinum. Men landsliðsvenjarin, Jan Pytlick kann fegnast um fyrsta sigurin hjá Danmark í einum endaspæli, síðani EM í 2006. Komandi dystur hjá Danmark fríggjakvøldið er ímóti Ungarn, sum tapti 21-27 ímóti Rumenia.

## Ajax tapti stórt

Ajax Keypmannahavn tók ímóti Århus GF á heimavølli í Bavnehøjhøllini í Keypmannahavn í gjárakvøldið. Ùrslitið gjørdist ein stórsigur uppá 33-22 til útiliðið úr Århus. Longu tá 20 minuttir vóru farnir, stóð illa til hjá Ajax, tá førdi Århus GF við heili 11 málum. Og frá støðuni 18-7 bleiv munurin verandi á 11 málum. Ajax hevur framvegis bert 4 stig í CBB liguni, og málsetningurin er at yvirliva í bestu donsku hondbóltsdeildini. Heini Hanusarson kom ikki á máltalvuna í gjárakvøldið.

**-heris**

## Skotland vil hava EM í 2016

Upprunaliga ætlaðu skotar einsamallir at bjóða uppá at verða vertir fyri EM-endaspælinum í fótbólti í 2016. Men nú tá UEFA hevur broytt endaspælið, soleiðis, at talið av luttakarum verður økt frá 16 londum til 24 lond, so síggja skotar seg ikki førar fyri at bjóða uppá at verða vertir fyri EM-endaspælinum einsamallir. Skotska fótbóltssambandið, SFA váttar, at teir hava samskift nógv við norðurírska fótbóltssambandið, IFA og walisiska fótbóltssambandið, WFA, um at leggja eitt felags boð inn, so øll tey trý bretsku londini kunnu vertir til EM-endaspælið í 2016.

Noreg og Svøríki ætla eisini at bjóða seg fram til at hýsa EM-endaspælinum í 2016. Sannlíkt er, at føroyska fótbóltssambandið fer at stuðla boðnum hjá Noregi og Svøríki.

**-heris**